## Eysturbúgvin farin nýggjan túr

Tað gongur væl hjá. Eysturbúgvanum (myndin) úr Húsavík. Trolarin er á gulllaksaveiðu, har hann samtrolar við Vesturbúgvan úr Vestmanna. Eysturbúgvin var inni í Runavík og landaði til Tavuna mánadagin. Skipið var fult.



## 200 á fundi um vegaføring í Leirvík

Mánakvøldið varð fundur í bygdarhúsinum í Leirvík, har eitt av stóru samrøðuevnunum í bygdini varð tikið fram – vegaføringarnar. Á fundinum luttóku umboð fyri Landsverk, verkfrøðingin Selmar Nielsen og bygdarráðið og sum greiddu frá teirri ovaru og teirri niðaru loysnini. Hóast talan er um eitt mál, sum at kalla hevur býtt bygdina í tvey, var talan um ein góðan og siðiligan fund. Enn dugir eingin at siga, hvørja støðu leirvíkingar fara at taka við fólkaatkvøðuna týsdagin. Men fólk hava nú helst fingið størri vitan um hetta málið.

# Tosa ikki bert um vegaføringar í Leirvík

**Hóast nógva tosið um, hvør vegaføring er tann besta fyri leirvíkingar, er eisini tíð at tosa um vegaforðingar og ferðslutrygd í bygdini. Nú skal okkurt gerast við vegin á Toftanesi**

FERÐSLA

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Leirvík**: Týsdagin skulu leirvíkingar taka støðu til, hvørja vegaføring tey ynskja í bygdini.

Fyri tey er hetta eitt stórmál, men tey smærru málini innan ferðslutrygd verða kortini ikki gloymd av hesi orsøk.

Framvið hesum vegnum á Toftanesi inni í bygdini eru fleiri familjur við børnum. Fyri hesi hevur tað sjálvandi sín stóra týdning at vegurin er tryggur at ferðast eftir, bæði hjá vaksnum og børnum.

Tey hava verið vitni til, og eisini havt ampa av skjótu og skilaleysu ferðsluni sum mangan er eftir vegnum, og ynsktu tí at venda sær til bygdarráðið at finna eina loysn.

Tá so fólk fóru til verka at savna inn undirskriftir, gekk ikki long tíð til flestu av íbúgvunum høvdu skrivað undir eina áheitan um tryggari ferðslu.

### Skjót avgerð

Í eina tíð hava tey savnað inn hesar undirskriftir við eini áheitan á bygdarráðið um at gera sítt til at ferðslan eftir hesum vegastrekkinum kann gerast tryggari.

Áheitan til bygdarráðið hevði hesa stuttu lýsingina: »Áheitan um vegaforðingar á vegin við Toftanes«.

Ikki kann sigast annað, enn at bygdarráðið tók hetta málið í størsta álvara og fekk skjótt tikið málið til viðgerð: Áheitanin varð handað bygdarráðnum 2. juni í ár, og longu fýra vikur seinni varð avgerð tikin í málinum.

Hetta hendi á fundi mánakvøldið í hesi vikuni. Tekniska nevndin tók fyrst undir við áheitanini frá borgarunum um vegaforðingar, og síðani avgjørdi bygdarráðið at fylgja hesi avgerðini.

Frammanundan hevur umsitingin havt fundir við millum annað sýslumannin og ferðslunevndina, har tey hava hugt eftir økinum fyri at vita, hvør er besta loysnin fyri tryggari ferðslu.

Í næstum verður so farið undir at fremja hesa avgerðina í verki.



*Við vegin á Toftanesi er nógv ferðsla og fleiri barnafamiljiur, og skal hann nú gerast tryggari*
*Mynd: leirvik.fo*

# Kári, kór og kantata í Klaksvík

**Kantatan JØRÐ fyri kór og orkestur verður framførd í Christianskirkjuni fríggjakvøldið**

KONSERT

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Í sambandi við 100 ára haldið hjá Klaksvíkar kommunu verður kantatan, sum varð skrivað til 25 ára hátíðarhaldið hjá Norðurlandahúsinum at hoyra í Christianskirkjuni 4. juli klokkan 20.

Kantatan, sum Kári Bæk hevur skrivað til yrking hjá Róa Paturssyni, er fyri blandað kór og orkestur og verða tað ensemblið Aldubáran og kórið Tarira, sum framføra verkið undir leiðslu av Bernhardi Wilkinson.

Kantatan varð umbiðin av Norðurlandahúsini til 25. ára hátíðarhaldið.

Á skránni í Christianskirkjuni hin 4. juli fer Aldubáran eisini at spæla eitt verk og kórið Tarira fer at syngja sangir, sum eru við á nýggju fløguni, kórið gevur út leygardagin 5. juli.

*Christianskirkjan er vælegnað til framførslur. Fríggjakvøldið verður serstøk kantata at hoyra*



## Skráin:

**Aldubáran:**
Sunleif RASMUSSEN: Surrounded

**Tarira:**
Thomas TALLIS:
Lamentation of Jeremia
Sunleif RASMUSSEN:
Døgg (Karsten Hoydal)
Pauli í SANDAGERÐI:
Náttúra (Christian Matras)
Karin REHNQVIST:
Bara du går över markerna (Bo Bergman)
Toru TAKEMITSU:
SAKURA (Cherry Blossom),
(folk song/Japanese trad.)

**Tarira og Aldubáran:**
Kári BÆK:
Jørð – kantata til Norðurlandahúsið 25 ár
(Rói Patursson)